# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Millumskúlaflokkur í 1938



Mynd frá "Realskúlaframsýningini 1916-66", sum Jórunn Dánjalsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í 2007. Í dag hava vit hesa myndina av næmingum í 4. millumskúlaflokki í 1938.

**Aftasta rað f.v.:** Karin Wellejus (g. Heik, býr í Kansas USA), Margit Lava Hansen (g. Hildebrand), Gudrun Djurhuus (g. Rubeksen), Lisa Eystberg (g. Michelsen), Guðlaug Helmsdal (g. Rayer) og Solveig Lava Hansen (g. Hildebrand).

**Triðja rað f.v.:** Ásla Pállsdóttir Hansen (g. Joensen), Ester Rein (g. Williamson, býr í London), Leivur Andreassen, Aksel Juul (sonur apotekaran), Evald Fuglø, Hans Hansen, Árni Olsen og Erik Juul.

**Annað rað f.v.:** Paulina (Minna) Michelsen, Mary Wikkelsøe, Ingrid Olsen (g. Olsen), Solveig Joensen (g. Dam), Poul Sørensen og Richard Long, lærari.

**Fremsta rað f.v.:** Christian Haraldsen (Basse), Trúgvi Árting, Petur Christiansen, Sverri Hansen (Trónd), Petur F. Christiansen og William Sloan

Um onkur hevur hug at ogna sær hesa mynd, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánjalsdóttir á telefon: 226024, (mynd nr. 47.

*Myndaeigari: Solveig Dam*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Margaret Falkvard, Sandavágur**, andaðist á Mørkini mánakvøldið, 81 ára gomul.

**Sørin Emil Olsen**, ættaður av Skála, búsitandi á Glyvrum, andaðist á Landssjúkrahúsinum 7. september, 89 ára gamal.

**Høgni Jacobsen**, ættaður úr Tórshavn, búsitandi í Saltangará, andaðist fríggjadagin, 58 ára gamal.

**Ísak Kristianson Bjarnaskor av Viðareiði** andaðist leygardagin á Landssjúkrahúsinum, 79 ára gamal.

### Dagurin

**9. september. Gorgonius**, doyði umleið ár 300. Ein av píslarváttunum í fornkirkjuni, sum varð tikin av døgum undir Diokletian keisara.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

†

**Sørin Emil Olsen**
vanliga nevndur Emil
ættaður av Skála
búsitandi á Glyvrum

andaðist á landsjúkrahúsinum 7. september
89 ára gamal.
Kistan fer úr Landsjúkrahúskapellinum
hósdagin kl. 17 heim í Glyvra Kirkju.
Jarðarferðin verður fríggjadagin kl. 13.

*Fyri tey avvarðandi*
**Helga**

Tey, sum vilja minnast Emil, kunnu lata Eysturoyar Ellis- og Røktarheimi eina gávu, konta í peningastovnunum

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum,
at elskaða mamma okkara

**Margaret Falkvard**
Sandavágur

fór heim til Harran mánakvøldi 7. septembur
81 ára gomul.
Í sambandi við at kistan fer vestur verður bønarløta
á Røktarheiminum Mørkini mikukvøldi kl 18.00.
Jarðarferðin verður hósdagin úr
Sandavágs kirkju kl 14.00.

*Familjunnar vegna*
**Ann-Margit og Heri**

Tey, sum ynskja at senda blómur ella kransar, kunnu ístaðin senda eina peningagávu til Mørkina, konta í peningastovnunum